## DAGSINS MEINING

# Føroyska loysnin

Fríggjadagin vóru boðini um nýggja landsliðsvenjaraparið endaliga staðfest. Einki er at ivast í, at nýggja samansetingin við Jógvan Martin Olsen, John Petersen og Jens Martin Knudsen fer at verða vigað bæði væl og virðiliga komandi dagarnar. Og líka lítið er at ivast í, at fleiri spurningar verða reistir hesum viðvíkjandi. Tað er einki at ivast í, at við nýggja venjaranum hevur Fótbóltssambandið lagt seg eftir einum venjara, sum hevur allar tær útbúgvingar, sum verða settar sum krav til eitt nú føroyskar fyrstudeildarvenjarar.

Og við føroysku loysnini hevur FSF eisini svarað teimum aftur, sum í nógv ár hava funnist at, at landsliðsvenjarin hevur verið búsitandi uttanlands. Og tí vil nýggi venjarin alt annað líka í størri mun hava fingurin á pulsinum við tí, sum fyriferst í føroyska fótbóltsheiminum. Hartil tykist tað eisini vera um eina greiða linju, har hildið verður fast um venjaran, sum í drúgt áramál hevur verið knýttur at arbeiðinum við yngru landsliðnum. Og sum tí - alt annað líka - eigur at vera førur fyri at byggja víðari á tað arbeiðið, sum er gjørt á hesum landsliðum. Hinvegin kann væl vera, at talan ikki er um nakað nýbrot, tá nýggi venjarin er sami maður, sum í níggju ár hevur verið hjálparvenjari. Og spurningurin kann helst eisini setast, hvørt hesin er førur fyri at geva landsliðnum nýggja íblásturin, sum ofta er ein fortreyt fyri støðugari menning.

Hartil er talan nú um ein hjálparvenjara, sum ikki hevur nakrar royndir sum venjari yvirhøvur, tó at royndir hansara sum spælari í føroyskum og altjóða høpi eru sera drúgvar.
Og talan er heldur ikki um ein profil á sama hátt, sum vit áður hava havt í sessinum. Uttanlands hava nøvn sum Allan Simonsen og Henrik Larsen ofta verið við til at taka trýstið av føroysku spælarunum, samstundis sum hesir hava skapt ein ávísan goodwill í útlendsku pressuni. Og tann parturin verður neyvan tann sami, nú talan er um ein fyrrverandi B68-spælara.

Hinvegin er talan um eitt konsept, sum FSF hevur valt at roynt. At vit hava ein tann best útbúna og royndasta føroyska venjaran, sum saman við tveimum av royndastu føroysku landsliðsspælarunum skal hava ábyrgd av liðnum. Hvussu hetta fer at hilnast, er so ein annar spurningur. Og tann spurningin fær eingin svarað, fyrr enn føroyska loysnin hevur staðið sína roynd.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svar til spurningar frá Jógvani Jacobsen

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Formaðurin í Unga Tjóðveldinum, Jógvan Jacobsen, spyr í einum lesarabrævi Sambandsflokkin nakrar spurningar, sum taka støði í einum mótmælisskrivi frá Norðoya Sambandsfelag viðvíkjandi arbeiðssteðginum, sum var fyrr í hesum mánaðnum.
Eg vil fegin svara spurningunum sum frægast.

Jógvan hevur tíverri misskilt skrivið og fær tað til, at felagið mótmælir, at ein tinglimur "slapp at hava egna meining". Tað sum Norðoya Sambandsfelag mótmælti var ikki, at tingmaðurin hevði eina meining, men at Norðoyggjar vóru avbyrgdar undir verkfallinum. Tað er ikki heilt tað sama.

Endurgevingarnar sum Jógvan tekur úr mótmælisskrivinum hjá Norðoya Sambandsfelag eru heldur ikki rættar. Til dømis skrivar hann: "*Orðingar í skrivinum siga, at felagið mótmælir, at tinglimurin "slapp" at hava egna meining, og "hetta kann avgjørt ikki loyvast""*. Orðið "slapp" er her tikið úr fyrsta reglubroti, orðini "at hava egna meining" standa als ikki í skrivinum, meðan orðini "hetta kann avgjørt ikki loyvast", eru tikin úr fjórða reglubroti. Soleiðis ber ikki til at endurgeva.

Millum annað út frá hesum spyr Jógvan Sambandsflokkin hesar spurningar: Tekur Sambandsflokkurin undir við hesum skrivi Norðoya Sambandsfelags? Er Sambandsflokkurin ímóti rætti hins einstaka at hava egnar meiningar og virka eftir teimum?

Svar: Sambandsflokkurin virðir, at øll skulu hava rætt til at hava sínar meiningar, og rætt til at boða frá sínum meiningum. Hetta er eisini galdandi fyri Norðoya Sambandsfelag. Um vit altíð eru samd, er ein heilt annar spurningur.

Sambandsflokkurin hevur onga samtykt, av tí slagnum, sum hana hjá tingbólki Tjóðveldisfloksins, um at tinglimur sum alment finst at formanninum, hevur sett seg uttanfyri tingbólkin. Í okkara flokki røkkur talufrælsið nógv longri enn so.

Tað er av stórum týdningi fyri ein og hvønn flokk, at tað ræður floksdisiplin innanfloks, og at floksins stevnuskrá verður fylgd. Tað er ongantíð nøktandi at tinglimir fara í sjálvdrátt uttan at flokkurin veit av. Tá er jú ikki grund til at melda seg inn í politiskan flokk. Styrkin við eini breiðari samgongu er, at hon forðar fyri, at lægsti felagsnevnari, ella ein absoluttur minniluti, rekur føroyskan politkk. Tær fylgjurnar kenna vit alt ov væl til í Føroyum.

Annars vil eg nýta høvi at takka bæði Jógvani og Norðoyar Sambandsfelag fyri at seta fokus á aktuellar politiskar spurningar.

# Fólkaflokkurin og skúlaverkið í Klaksvík

**Tað tykist sum um embætisverkið í høvuðsstaðnum við Norðoyatunnlinum sær ein gyltan møguleika at niðurleggja almennar stovnar í Klaksvík**

**John William Joensen**
*Norðoya Sambandsfelag*



Í Sosialinum tann 28. oktober 2005 verður fólkaflokstingmaðurin og landsstýrismaðurin í Mentanarmálum, Jógvan á Lakjuni, siteraður fyri at siga, at hann metir tað vera mest náturligt at Klaksvíkar HF-skeið verður flutt úr Klaksvík og inn í hansara egna valdømi.

Ráðharrin úr Fuglafirði sigur víðari í somu grein, at tað er hansara skylda at rationalisera raksturin av skúlaverkinum, og tá tað einans tekur 10 minuttir hjá Klaksvíkingum at koyra við bussi inn til hansara kommunu, so er tað náttúrligt at flyta skúlan úr Klaksvík.

Sum Norðoya Sambandsfelag skilir, so søkja munandi fleiri næmingar á HF í Klaksvík, enn tað søkja til HF á Kambsdali.
Vit fara at stuðla landsstýrismanninum í at rationalisera skúlaverkið, men viðvíkjandi Klaksvíkar HF-skeiði hevði tað sambært næmingagrundarlagnum verið rættast at flutt HF-skeiðið á Kambsdali til Klaksvíkar.

Havandi í huga útbyggingarnar á Tekniska Skúla í Klaksvík, sum eftir ætlan verða lidnar í 2007, eru góðir møguleikar fyri framtíðar samstarvið millum hesar skúlar.

Vit fara at minna landsstýrismannin í Mentanarmálum á, at hann sum landsstýrismaður eisini hevur ábyrgd av at menna skúlaverkið í Norðoyggjum og ikki einans í hansara egna valdømi.

# Ein sonn hending

**Hanna Kristiansen**

Ein dagin eg gekk ein túr, kom eg fram á eitt tjaldur við unga, bæði innviklað í ein og sama bummulstráð um beinini og kundu tí ikki flúgva. Fyrst tók eg tjaldrið og síðan ungan og fekk bummulstráðin av beinunum uttan at tey høvdu fingið skaða av tránum.

Fyrst slepti eg tjaldrinum og síðan tjaldursunganum, tað var sum um tjaldrið segði takk, tí tað fleyg fleiri ferðir runt tætt uppi yvir mær og síðan fleyg niður til sín unga, sum ikki var flúgvi førur.

Eg eygleiddi tey eina løtu, síðan havi eg ofta tonkt upp á hesa hending, sum eg haldi er verd at onnur gerast kunnug um.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.